# AGANEVNDIN

**KÆRA 13/2011**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: FC Hoyvík kærir 07Vestur fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 1. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 24.09.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 2. oktober 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

FC Hoyvík hevur kært 07Vestur fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum FC Hoyvík og 07Vestur tann 24. september 2011 í 1. deild menn.

Í kæruni vísir FC Hoyvík á, at 07Vestur nýtti ein leikara, sum er skrásettur hjá SÍ og tí er at meta sum ólógligur leikari fyri 07Vestur. Umrøddi leikarin er David Clarlund Petersen. Í kæruni verður somuleiðis víst til kæru 12/2010 hjá Aganevndini.

07Vestur er hoyrt í málinum og vísir á, at teir hava flutt fleiri leikarar men at hetta eina tíverri lá eftir.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál, sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 24. september 2011 varð dystur leiktur millum FC Hoyvík og 07Vestur í 1. deild menn. Leikarin David Clarlund Petersen leikti sambært upplýsingum í málinum fyri 07Vestur.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at nevndi leikari ikki var skrásettur sum lógligur leikari hjá 07Vestur, tá dysturin varð leiktur.

Í telefonviðtalu við aðalskrivaran í FSF hevur samskiparin hjá 07Vestur viðgingið, at teir høvdu fingið upplýst frá FSF, at í ár skuldu øll loyvini flytast til samanlagda felagið, og høvdu teir flutt "fleiri 100", men hetta eina lá tíverri eftir.

**4. Lógarverkið**

Grein 15 í Kappingarreglum fyri Fótbólt ásetur treytir fyri nær ein leikari kann metast sum lógligur leikari og lógliga kann luttaka í lands- og steypakappingini.

# AGANEVNDIN

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Aganevndin staðfesti í kærumáli 12/2010 at í kappingarárinum 2011 verða ongir linnar givnir frá kravinum í grein 15 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt fyri vantandi rætta skráseting av leikarum hjá samanløgdum feløgum.

Aganevndin staðfestir, at leikarin David Clarlund Petersen leikti sambært upplýsingum í málinum fyri 07Vestur í dystinum tann 24. august 2011 og at nevndi leikari ikki var skrásettur sum lógligur leikari hjá 07Vestur, tá dysturin varð leiktur.

**6. Niðurstøða**

Leikarin David Clarlund Petersen leikti ólógliga í dystinum tann 24. september 2011 millum FC Hoyvík og 07Vestur, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður 07Vestur 1. deild menn dømt at tapa dystin móti FC Hoyvík 24. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 4. oktober 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna